## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, seinnapartin nakað minni vindur. Ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi, um kvøldið minni vindur. Ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar og hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið sunnudagin**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin gul til stívt andøvsgul av vestri, týsdagin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 11 og 15 stig.

# Kommunuskúlin verjir umhvørvið

**Týskvøldið var ein nýggj umhvørvisvirðisløn fyri fyrstu ferð latin í Tórshavnar kommunu, og tað gjørdist Tórshavnar Kommunuskúli, sum fekk virðislønina**



*Stór umhvørvisvika er í Havn og tiltøk eru í øllum býnum í samband við vikuna*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Umhvørvisvirðislønin er áljóðandi 10.000 krónur, og fram til 17. apríl kundu øll innstilla onkran, tey halda hava uppiborið eitt herðaklapp fyri okkurt gott umhvørvisarbeiði ella -átak, og eisini ber til at innstilla seg sjálvan til virðislønina.

Umhvørvisvirðislønin, sum er eitt tiltak í sambandi við Umhvørvisvikuna 2009, var handað í Posthúskjallaranum týskvøldið, har sætti flokkur í kommunuskúlanum tók ímóti.

Nógvar innstillingar vóru til umhvørvisvirðislønina, sum kundi verða grundgivin við orkusparandi tiltøkum, varandi orku, skiljing av burturkasti, endurnýtslu, kunning um umhvørvisvernd, dálkingarfyribyrgjandi átøkum, vistfrøðiligum átøkum, umhvørvisvinarligari ferðslu og øðrum.

Umhvørvisvikan heldur fram restina av vikuni, og stóra brakið verður leygardagin, tá stórur konsert verður í Tórsgøtu.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | 10 |
| Madrid | -- |
| Róm | 16 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 19 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 31 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 34 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt djúpt lágtrýst, 968 hPa. í útsynning úr Føroyum fer í landnyrðing og grynnist nakað. Brúgvalagið yvir Føroyum fer norðureftir.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Føroyar fer í landnyrðing og dregur kaldari luft av útnyrðingi móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/04 kl. 06[00] – 29/04 06[00]. Hitin í gjár: 6,8°
Minsti hiti máldur í mai: -8,7° - Mesti hiti máldur í apríl: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 28/04 kl. 06[00] – 29/04 06[00].
Avfallið higartil í mai: 20 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

28.apríl — Mánin næstur jørðini
1.mai — Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. mai | 05:54 | 18:15 | 04:54 | 17:15 | 05:09 | 17:30 | 07:54 | 20:15 | 08:54 | 21:15 | 04:09 | 16:30 | 03:09 | 15:30 | 06:09 | 18:30 | 07:09 | 19:30 | 05:39 | 18:00 | 06:54 | 19:15 |
| 8. mai | 06:37 | 19:00 | 05:37 | 18:00 | 05:52 | 18:15 | 08:37 | 21:00 | 09:37 | 22:00 | 04:52 | 17:15 | 03:52 | 16:15 | 06:52 | 19:15 | 07:52 | 20:15 | 06:22 | 18:45 | 07:37 | 20:00 |
| 9. mai | 07:24 | 19:48 | 06:24 | 18:48 | 06:39 | 19:03 | 09:24 | 21:48 | 10:24 | 22:48 | 05:39 | 18:03 | 04:39 | 17:03 | 07:39 | 20:03 | 08:39 | 21:03 | 07:09 | 19:33 | 08:24 | 20:48 |
| 10. mai | 08:13 | 20:37 | 07:13 | 19:37 | 07:28 | 19:52 | 10:13 | 22:37 | 11:13 | 23:37 | 06:28 | 18:52 | 05:28 | 17:52 | 08:28 | 20:52 | 09:28 | 21:52 | 07:58 | 20:22 | 09:13 | 21:37 |
| 11. mai | 09:02 | 21:27 | 08:02 | 20:27 | 08:17 | 20:42 | 11:02 | 23:27 | - | 12:02 | 07:17 | 19:42 | 06:17 | 18:42 | 09:17 | 21:42 | 10:17 | 22:42 | 08:47 | 21:12 | 10:02 | 22:27 |